Hósdagur 20. januar

RÚV

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur**
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Mogun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Mogun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e)
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Tey tiggju boðini**- níggjunda og tiggjunda (e) - Armgarð Arge stilar fyri
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stilar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Tónleikur í trettan øldir** (e) - 1 av 8 sendingum. Kári Sverrisson stilar fyri
11.30 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e) - Sigmar Bláberg skipar fyri
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stilar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stilar fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen leggur til rættis
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stilar fyri
20.30 **Tornið á heimsins enda** - 6. partur av skaldsøgu eftir William Heinesen. Hans Thomsen týddi og las.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

RÁS 2

07:30 **Góðan morgun!** - Dagurin í dag
08:00 **Lættur tónleikur**
09:45 **Orðið** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr blaðunum, veðurlagnum, koyrilikindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11:03 **Elvis 2** (e) - Sonne Smith leggur til rættis
12:00 **Tíðindi**
12:15 **Middagstónleikur**
13:00 **Norðurlendskur dansitónleikur**
14:00 **Rolling Stones Non Stop**
15:00 **Tíðindi**
15:15 **Blandaður tónleikur**
16:00 **Seinnapartur** - Lætt innsløg. Smátíðindi. Tónleikur.
17:00 **Barnasending** - Hugnaløta fyri og prát við børn - Anja Hansen leggur til rættis
17:30 **Non Stop Country**
18:00 **Tíðindi**
18:15 **Nátturðatónleikur**
19:00 **Stuttsøga** - Sonne Smith lesur
20:00 **Sláttur** (fyrri partur) - Gott nýtt og gamalt, hugnasending við við ymsum innsløgum fyri tilkomin. - Martin Samark leggur til rættis
21:00 **Tíðindi**
21:15 **Sláttur** (annar partur)
22:00 **Brævakassin** - Lurtarin velur løgini. - Suni Jacobsen skipar fyri
23:00 **Love Songs**
00:00 **Orðið**
00:15 **Náttartónar** - Hon spælir alla náttina

SVF

18.10 **Hvat nú** - sending fyri deyv
18.30 **Økskufía** 3:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **Satya - bønin til fíggindan** - am. dok.
21.15 **Krimitímin: Kellingabokslið**1:3 - ensk krimirøð
22.05 **Ferðafrásøgn:París**
22.55 **South Park 9** - am. kult-teknirøð
23.20 **Liðugt**

3

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst Special**
19.30 **Murder Live**
21.15 **SexOrama**
21.45 **Verdens værste naboer**
22.15 **Dagens Nyheder på TV3**
22.25 **Drew Carey**
22.55 **Skadestuen**
23.50 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.25 **I lyst og nød**
0.55 **Ellen**
1.25 **Caroline, karrieren og kærligheden**
1.55 **Hvide Løgne**
2.25 **Godnat**

EUROSPORT

7.30 **Rally**
8.00 **Bobsleigh**
8.15 **Biathlon** -live
9.30 **Tennis** -live
12.00 **Tennis**
18.30 **Football** -live
20.30 **Boxing**
21.30 **Rally**
22.00 **Rally**
22.15 **Tennis**
23.15 **Luge**
23.45 **Rally**
0.15 **Rally**
0.30 **Close**

BBC WORLD

0.00 **World News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **World News – Weather**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News – Weather**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News – Weather**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News – Weather**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report – Weather**
13.30 **The World Today**
14.30 **Top Gear**
15.00 **World News – Weather**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News – Weather**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Panorama**
21.00 **World News**
21.10 **World Business Report – Weather**
21.30 **Earth Report: »Water Ways«**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

BBC PRIME

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »West Africa – Oil on the Delta«**
1.20 **TLZ: »The Geography Programme – France 2000 – Paris«**
1.40 **TLZ: »The Geography Programme – France 2000: Massif Central«**
2.00 **TLZ: »What is Religion?«**
2.30 **TLZ: »The Rainbow«**
3.00 **TLZ: »Refining the View«**
3.30 **TLZ: »Birth of Liquid Crystals«**
4.00 **TLZ: »Mexico Vivo – Mexico Indigena«**
4.30 **TLZ: »Mexico Vivo – Somos Gente de Maiz«**
5.00 **TLZ: »Computing for the Terrified – Hands off«**
5.30 **TLZ: »Look ahead«**
6.00 **Dear Mr. Barker**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Nursery Nurses«**
8.20 **Change that: »Newark«**
8.45 **Kilroy: »I Hate The Way I Look«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »Radical Highs**
11.15 **TLZ: »Radical Highs**
11.30 **Ready Steady Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Newark«**
13.00 **Style Challenge: »Nursery Nurses«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Ground Force: »Yate-Bristol«**
14.30 **Ready Steady Cook**
15.00 **Dear Mr. Barker**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Three up Two down**
17.00 **Allo Allo**
17.35 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »New Faces«**
19.00 **Last of the Summer Wine: »Once in a Moonlit«**
19.30 **Only Fools and Horses: »A losing Streak«**
20.00 **Casualty: »Off the Wall«**
21.00 **Shooting Stars**
21.30 **Comedy Nation**
22.00 **Truth or Dare**

SvF – Hósdagur kl. 20.50:

Satya – bønin til fíggindan

Virðislønt amerikonsk dokumentarsending

Tibetanskar nunnur greiða frá um, hvussu mannarættindi verða kúgað undir kinesisku hersetingini. Og tær royna at greiða okkum frá, hví stríð teirra skal gerast uttan at nýta vald.

SvF – Hósdagur kl. 21.15:

Krimitímin:

Kellingabokslið 1:3

Ensk krimirøð eftir Minette Walters

68-ára gamla Mathilda Gillespie liggur deyð í baðikarinum. Hon hevur tikið ov nógvar tablettir og skorið seg í skøvningarnar. Meira skelkandi er tó eitt kellingabokslið – eitt aldargamalt pínslutól – sum er spent um høvd hennara. Hetta er ein ógvusligur og ræðandi deyði, men er tað sjálvmorð ella morð?

Leikarar: Miranda Richardson, Bob Peck, Douglas Hodge

Leikrit: Tony Bicat eftir skaldsøgu hjá Minette Walters

Leikstjórn: David Thacker.

TV3 – Hósdagin kl. 19.00:

Efterlyst special

Hin 51 ára gamle café-tænarin, Conny Birgitte Svendsen, var avbukað og kvald í íbúð sínari hin 1. september 1997. Slóðirnar hjá løgregluni eru, at hon áðrenn hendingina hevði sitið og roykt og drukkið saman við banamanni sínum, áðrenn hendingina. At byrja við metti løgreglan, at tey høvdu góðar slóðir at fara eftir, og at dráps maðurin fór at verða funnin innan langa tíð, men soleiðis varð ikki. Ferðaliðið hjá ríkispolitinum hevur vent málinum bakið, og í dag er bert ein løgreglumaður í Rønne, sum framhaldandi arbeiðir við málinum. Hann sigur at hann hevur lovað Conny, at teir skulu finna dráps mannin fyrr ella seinni.

TV3 – Hósdagin kl. 19.30:

Murder Live

Amerikonsk sending frá 1997

Frank McGrath hevur vápn við sær, og tekur øll inniverandi til gíðslar, tá eitt talkshow verður tikið upp. Orsøkin til hetta er, at dóttir hansara gjørdi sjálvmorð, orsakað av eini avdúking í hesi sending. Frank greiðir frá, at hann hevur goymt eina bumbu í sjónvarpsstovuni, og hann krevur at sjónvarpsverturin, Pia Postman, tekur ábyrgdina fyri deyða dóttur hansara. Við hesum byrjar ein óhugnalig sending, sum verður varpað beinleiðis til milliónir av hyggjarum.

TV3 – Hósdagin kl. 21.15:

SexOrama

Tað sær lætt úr, men tað krevur, at vant verður í fleiri ár. Talan er um, hvussu tú letur teg úr klæðunum, striptease. SexOrama hyggur í hesi sendingini eftir strippara-drotningini, Lene Ziegler. Í 13 ár hevur hon havt starv sum strippari, og í dag hevur hon sítt egna booking-felag. SexOrama er við Lenu, tá hon lærir nýggjar stripparar, eins og vit síggja, hvussu lív verður sett í føðingardagar við mannfólkastrip, hvussu hon gevur bodytequila og tá hon er við sínum stripparum í Malmø.

Eisini hevur Lene onnur ítriv, og vit síggja, hvussu hon er nummardama í boksiringinum, eins og vit síggja hana sum gospelsangarinnu, tá hon er hjá hvítusunnusamkomuni.

TV3 – Hósdagin kl. 21.45:

Verdens værste naboer

Ensk dokumentarsendirøð

Hetta kvøldið hoyra vit keðiligu søguna um, hvussu illa tað kann ganga, tá tveir brøður gerast óvinir. Lívið er heldur ikki lætt hjá pakistanaranum, Hussain, og gentu hansara, Linda Livingstone, sum hava teirra egna handil, men verða plágaði av fleiri fólkum í grannalagnum.

Eisini hitta vit tvey hjún, sum eru troytt av hoyra, hvat grannin ger, tí tey hoyra alt, sum gongur fyri seg, gjøgnum tunnu veggirnar í raðhúsum teirra.

Danskar oljuinntøkur sleppa lagaliga í skatti

Sammett við hini londini við Norðsjógvin verða oljuinntøkurnar í Danmark sera lagaliga skattaðar. Donsku vísmenninir mæla til at skatta størru økini harðari enn tey minnu

Donsku vísmenninir vænta, at donsku og útlendsku feløgini fara at vinna tilsamans 51 milliardir krónur á donskum øki komandi 13 árini

Jan Müller

Samanborið við Holland, Noreg og England førir danski staturin ein lagaligan skattapolitikk móti oljuinntøkunum, skrivar blaðið Aktuelt.

Blaðið vísir á, at tey samtøk, sum virka á donskum øki, sleppa væl í skatti, og millum hesi samtøk eru DUC við Mærsk, Texaco og Shell.

Donsku vísmenninir vænta, at donsku og útlendsku feløgini fara at vinna tilsamans 51 milliardir krónur á donskum øki komandi 13 árini.

Eftir at hava kannað og samanborið skattingina av norðsjóvarolju í Danmark, Noregi, Hollandi og Englandi siga vísmenninir, at ein progressivur skattaskali kundi verið nýttur á danska økinum.

Av norðsjóvarlondunum er tað bert England, ið hevur linari skattapolitikk enn Danmark. Bæði Noreg og Holland hava ein harðari skattapolitikk, og Holland er tað landið, sum skattar oljufeløgini harðast.

Nógv hægri enn Danmark

Hollendska skattaskipanin tekur næstan tvær og eina hálva ferðir hægri skatt frá oljufeløgunum enn danska skipanin. Danski statskassin fær 23 krónur í skatti av hvørjari tunnu av olju, meðan tann hollendski statskassin fær 54 krónur.

Hetta merkir, at um Danmark nýtti hollendsku skipanina, hevði danski statskassin bert í 1997 fingið eina meirinntøku upp á fýra milliardir krónur.

Ein framrokning, sum vísmenninir hava gjørt, vísir, at Danmark hevði fingið 62 milliardir tey komandi 13 árini, hollendska skipanin var nýtt. Við núverandi skattareglum fær Danmark hesi árini 29 milliardir í skatti. Tað er fram til 2012, tá núverandi loyvisavtala gongur út.

Donsku vísmenninir gera tó vart við, at ein orsøk til at Holland fær hægri skattainntøku av oljuvirksemi er, at í Hollandi verður olja framleidd á landi, og sostatt er talan um ein framleiðsluhátt, sum ikki er so kostnaðarmikil sum at vinna olju úr havinum.

Fleiri oljumilliónir í kassan

Tí kann Danmark ikki fáa somu skattainntøkur sum Holland.

- Men haðani og til at hava so lagaligar treytir, at flent verður eftir okkum, kann ikki verða meiningin, sigur Martin Glerup við Aktuelt. Hann er orkupolitiskur ørðførari hjá danska javnaðarflokkinum.

Hann kann saktans ímynda sær, at staturin kann fáa ein størri part av oljuinntøkunum í framtíðini, og hann leggur dent á, at viðkomandi loyvissamráðingar er neyðugt at vera vakin, men hann leggur dent á, at núverandi avtalur skulu ikki broytast.

Orsøkin til lága skattatrýstið á oljuvirksemi í Danmark er, at staturin hevur ynskt at hava stórt virksemi í norðsjónum innan leiting og útvinnan, soleiðis at Danmark kundi gerast sjálvveitandi við olju og harvið óheft av øðrum londum. Tað er greitt, at skattapolitikkurin hevur havt við sær, at Danmark er vorðið sjálvveitandi í dag.

Tó vísa vísmenninir á, at skattaskipanin kann betrast, og teir halda, at størru økini skulu skattast harðari enn tey minnu økini, soleiðis at staturin fekk fleiri oljumilliardir í kassan.







Á talvunum sæst gongdin í framleiðslu, yvirskoti eftir skatt hjá avíkavist donskum og útlendskum feløgum og samlaður skattur. Her er talan um samanbering av tveimum tíðarskeiðum, 1963 til 1998, og 1999 til 2012ø Allir prísir eru í 1998-krónum. Gongdin vísur millum annað, at yvirskotið hjá feløgunum er nógv vaksið, meðan skatturin hjá statskassanum minkar.